# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 27.02.2017*

**<u>Bygdaráðsfundur: 27.02.2017 kl. 17.00 til kl. 18.30</u>**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

**<u>Mál nr. 13/2017 Alment virksemið yvirhøvur</u>**

<u>J. nr. 00.22.00-A21-6-17</u>

**Málslýsing**

Onnur viðgerð av kommunustýrisskipanini. Fyrsta viðgerð var á bygdaráðsfundinum 30.01.2017.

Í sambandi við, at bygdráðið hevur viðtikið at strika Vinnunevndina, er neyðugt at dagføra kommunustýrisskipanina samsvarandi, vísandi til § 5 í kommunustýrislógini .

Uppgávurnar, sum vóru undir Vinnunevndin eru lagdar út til aðrar nevndir.

**Tilmæli**

Á fundi 24.01.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við broytingunum í kommunustýrisskipanini soleiðis, sum hon er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Tilmæli**

Á fundi 21.02.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av kommunustýrisskipanini soleiðis, sum hon er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 14/2017 Ognir og hølir</u>**

<u>J.nr.82.20.00-P20-1-15</u>

**Málslýsing**

Onnur viðgerð av tilboðnum uppá kavafang á barnagarðinum. Fyrsta viðgerð var á bygdaráðsfundinum 30.01.2017.

Teknistovan í Gøtu hevur, vegna Nes kommunu, biðið um tilboð uppá kavafang til tekjuna á barnagarðinum.

Í skrivi 14.12.2016 er tilboð komið frá Byggivirkinum KBH áljóðandi kr. 84.000 við 6,25 % mvg:

**Tilmæli**
Á fundi 21.01.2017 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá Byggivirkinum KBH, uppá kavafang til barnagarðin, áljóðandi kr. 84.000.

Á fundi 24.01.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at abeiðið verður fíggjað við tøkum peningi.

**Tilmæli**
Á fundi 21.02.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av tilboðnum frá Byggivirkinum KBH, uppá kavafang til barnagarðin, áljóðandi kr. 84.000,00, og at arbeiðið verður fíggjað við tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 15/2017Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-9-15
**Málslýsing**
Uppskot til grannskoðaraprotokoll frá 2. februar 2017 um ábyrgdarbýtið av roknskaparframløguni, vavið og endamálið við grannskoðanini.

**Tilmæli**
Á fundi 21.02.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við grannskoðaraprotokollini frá 2. februar 2017 soleiðis, sum hon er uppsett.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 16/2017 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.22.00-A21-2-17
**Málslýsing**
Bygdaráðið skal velja umboð í nevndina fyri bygdabókasavnið, sum er í Tofta skúla.

**Tilmæli**
Á fundi 15.02.2017 mælir Mentanarnevndin til, at Sólveig Debess, Josefina Jacobsen og Jaspur Langgaard verða umboð í nevndini fyri bygdabókasavnið hetta valskeiðið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 17/2017 Undirvísing**
J.nr. 17.01.10-P05-1-17
**Málslýsing**
Í longri tíð hevur verið tosað um, at eitt navn mátti finnast til samstarvið um forskúlatilboðið "jul til jul", sum barnagarðurin og Tofta skúli samstarva um.

Tofta skúli og Barnagarðurin komu við hvør sínum tilmæli um navn. Mentanarnevndin fekk sostatt tvey uppskot til støðutakan "Samspírin" og "Slóðin"

**Tilmæli**
Á fundi 15.02.2017 mælir Mentanarnevndin til, at navnið fyri samstarvið, "jul til jul", verður "Samspírin".

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 18/2017 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.03.25-P20-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi 03.03.2016 søkir EJ Maskinur um grundstykki sunnanfyri verandi neyst í Krabbur.

Endamálið er at byggja eitt høli til at goyma amboð í, og er hann sinnaður at byggja líknandi neystunum.

**Tilmælir**
Á bygdarráðsfundi 25.04.2016 var mælt til at koyra málið aftur í nevnd fyri at viðgera ásetingina í byggisamtyktini fyri økið.

**Avgerð**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Tilmæli**
Á fundi 12.02.2017 mælir Tekniska nevnd frá at játta grundstykkið, grundað á byggisamtyktina hjá Nes kommunu, fyri økið, har umbidna grundstykki liggur, og í skrivi vísa umsøkjaranum á økið inni við Rætt, norðanfyri høllina hjá Falkon, sum kommunan hevur ætlanir um at gera byggibúgvi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var samtykt við 6 atkvøðum, Jóhannus Danielsen, Elin á Torkilsheygggi, Niclas Davidsen, Petur Jákup Petersen, Kaj Eli Hansen og Høgni Hansen atkvøddu fyri. Súni í Hjøllum atkvøddi blankt.

**Mál nr. 20/2017 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J. nr. 02.34.02-P20-3-17
**Málslýsing**
Í skrivi 05.02.2017 søkir Justin Philbrow um loyvi til at byggja afturat sethúsunum á matr. nr. 344, Høganesvegi 24, til víddar 52 m$^{2}$.

**Tilmæli**
Á fundi 14.02.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta Justin Philbrow loyvi til uppíbygging, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 22/2017 Bókasavnsvirksemið**
J.nr. 21.00.00-Ø09-1-15
**Málslýsing**
Roknskapurin hjá Bókasavninum fyri 2016 er blivin grannsk. av SPEKT og er sendur kommununi til góðkenningar.

**Tilmælir**
Á fundi 15.02.2017 mælir Mentanarnevndin til at taka undir við roknskapinum fyri 2016 hjá Bókasavninum í Nes kommunu soleiðis, sum hann er uppsettur.

Á fundi 21.02.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 23/2017 Fólkaupplýsing og frítíðarvirksemið**
J.nr.18.15.00-S49-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi 14.02.2017 heitir Ungdómshúsið á Nes kommunu um at økja stuðulin til Ungdómshúsið við kr. 200.000,00 í hesum árinumum soleiðis, at virksemið kann halda fram á sama hátt sum í dag.

Runavíkar kommuna hevur stuðlað ungdómshúsinum fíggjarliga við kr. 200.000 árliga. Saman við stuðlinum hjá Nes kommunu, eisini á kr. 200.000, hevur hetta verið avgerandi partur av fíggjarliga grundarlagnum hjá húsinum. Stuðulin frá Runavíkar Kommuna steðgar frá 1. mars 2017.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 27.02.2017*

**Tilmælir**
Á fundi 20.02.2017 mælir Trivnaðarnevndin til, at hækka játtanina við kr. 100.000,00 fyri 2017, og at Ungdómshúsið tillagar raksturin eftir hesum.

Trivnaðarnevndin arbeiðir víðari við eini framtíðarloysn.

Á fundi 21.02.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

Á fundi 21.02.2017 mælir Fíggjarnevndin til, at skriv verður sent til Runavíkar kommunu við áheitan um framhaldandi at stuðla Ungdómshúsinum á Toftum.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.